# Dollarin trýstir eisini upsaprísin

**- At bæði dollarin og brasilski realurin eru minkaðir í virði, hevur negativan týdning fyri føroyskar útflytarar, sigur Vinnuhúsið**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*

Herfyri vísti Vinnuhúsið á, at hýsuprísurin er nógv fallin, tí dollarin er fallin í virði.

Men tað er ikki bara hýsan, ið hevur tað trupult, nú virðið á dollaranum er minkað. Upsin hevur eisini sítt at stríðast við.

Vinnuhúsið sigur, at londini, sum keypa saltaðan upsa, eru øll meira ella minni tengd at dollaranum, eitt nú Brasilia, Jamaika, Meksiko og Puerto Rico.

### Tvífaldur "virkningur"

- Tá ið dollarin fellur 20%, fellur prísurin í krónum til føroyska útflytaran fyri hendan fisk eisini 20%. Brasilski realurin er haraftrat minkaður nógv í mun til dollaran. Hetta gevur so aftur tvífaldan "virkning" - tann skeiva vegin - fyri føroyskar útflytarar.

Eins og við hýsuni, er upsaprísurin á marknaðinum eisini lækkaður.

### Minni keypiorka

Vinnuhúsið sigur, at í Brasilia innflyta tey eini 12.000-15.000 tons av saltaðum upsa um árið.

- Aftrat fallinum í gjaldoyranum, er keypiorkan í Brasilia eisini minkað. So, tilsamans hava hesi viðurskifti lagt hart trýst á upsaprísin.

Vinnuhúsið vísir á, at marknaðarstøðan er tann sama í londunum í Caribiska havinum og í Miðamerika.



*Tað er ikki bara hýsuprísurin, sum er trýstur av gjaldoyrafalli, men eisini prísurin á saltaðum upsa*






*Alivinnan hevði eitt vánaligt ár 2002, og sum heild hevði vinnan hall*

# Árið 2002 er vánaligasta árið, síðan alivinnan reisti seg aftur

**Prísirnir á alifiski hava ongantíð verið so lágir sum í ár 2002. - Størsta forðingin fyri vøkstri, er vantandi vágafúsur kapitalur, lágur marknaðarprísur og ILA-sjúkan, sigur Føroya Havbúnaðarfelag, sum hevur havt aðalfund**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tríggir nevndarlimir stóðu fyri vali á aðalfundinum hjá Føroya Havbúnaðarfelag seinasta fríggjadag. Allir vórðu afturvaldir, og í nevndini sita: Hans Jacobsen, formaður, Atli Gregersen, Suni Durhuus, Høgni Jacobsen og Grímur Rasmussen. Sum tiltakslimir vórðu valdir Bogi Jacobsen og Heini Gregersen.

Havbúnaðarfelagið hevði bjóðað landsdjóralæknanum, Bjørn Harlou, løgmanni, Anfinni Kallsberg og Per Dag Iversen, projektleiðara hjá FHL í Noregi, við á fundin.

Løgmaður hevði innlegg um marknaðaratgongd føroyinga, og Bjørn

Harlou tosaði um ILA. Per Dag Iversen greiddi frá teirra royndum við dumpingmálum.

### Vánaligt ár

Í ársfrágreiðing felagsins verður ásannað, at farna ár eisini hevur verið merkt av ILA og BKD, sum viðførdi stórt felli fyri fleiri alibrúk. Lági prísurin fylgdi eisini við langt út á heystið, og tí vóru øll útlit til eitt vánaligt ár hjá føroysku alivinnuni.

Felagið sigur, at nøgdin, sum tikin varð í 2002, var í kruvdari vekt 36.863 tons av laksi og 8.362 tons av sílum.

- Vit væntaðu, at nøgdin av laksi fór at verða størri, men av tí, at ILA sjúkan herjaði, varð fiskurin tikin skjótari og við einari lægri miðalvekt. Útflutningurin fyri laks minkaði í nøgd í mun til 2001, sjálvt um stykkini vóru fleiri.

Felagið fegnast tó um, at útflutningsvirðið er eitt vet hægri í 2002 enn undanfarna ár. Orsøkin er ein lutfalsliga stór nøgd av sílum.

- Útflutningurin av alifiski var 943 milj. kr. í 2002 – ella 23% av samlaða útflutningsvirði føroyinga, ið var 4,1 miljardir.

Havbúnaðarfelagið sigur, at prísirnir hava ongantíð verið so lágir sum í 2002. Miðalprísurin fyri alifisk, tá ið góðskaðar vørur eru tiknar við, var 21,73 kr./kg.

Forsøgnin fyri 2003 í kruvdari vekt er 38.600 tons av laksi og 7000 tons av sílum, sum er á leið tað sama sum í 2002.

### ILA og dumping

Felagið sigur, at alivinnan sum heild hevur havt hall í 2002, og sum stein omaná byrðu, fekk vinnan fyrst dumpingákæru fyri laks og beint eftir dumpingákæru fyri síl.

- Samanumtikið er líkt til, at árið 2002 er tað vánaligasta, síðan vinnan reisti seg eftir kreppuna.

Felagið heldur, at tað, sum er av alstórum týdningi, er, at

sjúkutrupulleikin verður burtur, og at fiskurin verður koppsettur.

- Niðurberjingarætlan er gjørd og skal fylgjast, tá ið ES hevur góðkent hana. Arbeitt hevur verið við koppingarevni fyri ILA, men útlitini eru ikki góð fyri at fáa koppingarevnið í ár, sigur Havbúnaðarfelagið.

### Tríggjar forðingar

Í ársfrágreiðingini verður víst á, at kappingin við onnur lond, serliga Chili, er harnað, tí nøgdirnar av alifiski veksa alsamt - og skjótari, enn heimurin er førur fyri at svølgja. Prísurin verður tí trýstur av tí stóru nøgd, sum verður framleidd fyri ein lágan kostnað.

- Spurningurin hjá føroysku alivinnuni er tí í løtuni, um tað ber til at lækka kostnaðarstøðið enn meira – ella, um farast skal undir eina øðrvísi framleiðslu, sigur felagið.

Størsta forðingin fyri vøkstri, heldur felagið er vágafúsur kapitalur, lágur marknaðarprísur og ILA.

### Nógv færri síl

Havbúnaðarfelagið væntar, at framleiðslan av alifiski fer at minka, tí ov lítil tøkur, vágafúsur kapitalur er.

Í 2003 verður nøgdin tann sama, bæði fyri laks og síl. Í 2004 verður

nøgdin tann sama fyri laks, men fyri síl minkar framleiðslan munandi.

- Væntast kann, at sílaframleiðslan í kruvdari vekt í 2004 bert verður 5.500 tons og í 2005 2.000 tons, sigur Føroya Havbúnaðarfelag.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Eirikur Ingvarsson pensioneraður



Mikudagin 12. mars verður Eirikur Ingvarsson á Norðskála 67 ár. Samstundis verður hann pensionistur. Eirikur er føddur á Akureyri 12. mars 1936. Sum 25 ára gamal fór hann til Danmarkar at lesa til byggiverkfrøðing. Har hitti hann konunu Vibeke, sum er úr Keypmannahavn, og fluttu tey til Føroya í 1967, tá danska byggigelagið E.Pihl & Søn bygdi Statshospitalið, og Eirikur var ein av verkfrøðingunum har. Tey búðu í Havn og Eirikur arbeiddi hjá E.Pihl & Søn til 1974. Eina tíð búðu tey í Streymnesi, tá hann arbeiddi á elementvirkinum hjá Árna Brattaberg. Tey bygdu sær hús á Norðskála og hava búð har síðan 1978. Eirikur arbeiddi eisini í nógv ár hjá Guttesen & Staksberg. Sum byggiverkfrøðingur hevur Eirikur verið við í nógvum stórum verkætlanum, sum t.d. havnabyggingum í Havn, Vestmanna, Eiði og í Skopun. Hann var eisini við til at byggja brúnna um Streymin. Í 90-unum arbeiddi hann í Týsklandi í Bangladesh. Seinnu árini arbeiddi hann í Vágatunnlinum fyri J.K. Petersen. Seinastu tíðina hevur Eirikur arbeitt á ruskplássinum á Oyrabakka og er Sunda kommunu til hjálpar, um okkurt tekniskt skal gerast. Honum dámar væl at fiska síl, fáast við seyð, kálvar, kalkunir og at vera til útróðrar. Eirikur og Vibeke eiga 4 børn og 7 ommu og abbabørn.

**mg**

## Harry Hansen heldur røðuna



Á grækarismessuhaldinum í Runavík í dag við Býráðshúsið kl 17:30 verður tað Harry Hansen, ið fer at flyta fram røðu. Nes Sóknar Hornorkestur fer at spæla, og skótarnir ganga skrúðgongu.

Skrúðgongan fer frá Posthúsinum kl. 17.15.

## Bjarne Hansen gevst hjá A.P. Møller

30. juni í ár fer Bjarne Hansen frá sum stjóri hjá A.P. Møller. Hann er í uppskoti til at verða valdur í stýri fyri Københavns Lufthavne A/S, sum fevnir um floghavnirnar í Kastrup og Tune við Roskilde. Københavns Lufthavne A/S hevur eisini fíggjarlig áhugamál í Norra, Onglandi og Mexico. Uppskotið um at velja Bjarne Hansen, er komið frá stýrinum fyri lufthavnina, og har verður roknað við at innstillingin verður fylgd. Í løtuni er Bjarne Hansen stjóri fyri virksemi hjá A.P. Møller í Fjareystri og býr í Singapore. Hann er 62 ára gamal.

**mg**





## Snorri Fjallsbak formaður

Tá Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag hevði aðalfund 26. februar, varð Snorri Fjalsbark valdur til formann. Hann varð valdur beinleiðis á fundinum, og loysir hann av Jóannes Dalsgarð, sum hevur verið formaður seinastu árini. Jóannes bar seg undan afturvali.

Snorri Fjallsbak hevur í fleiri ár verið virkin tjóðveldismaður. Hann hevur eisini stillað upp til val. Dagliga yrki hansara er í studentaskúlanum, har hann undirvísir í náttúrufrøði og matematikk.

Nevndin í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag hevur skipað seg og sær nú soleiðis út:

Snorri Fjallsbak, formður
Laufey Blaasvær, næstformaður
Ragnar Magnussen, skrivari
Kristian Hansen, kassameistari
Eyðfinnur í Búðini

## Benny Brockie miðilsgrafikari

10. februar varð Benny Brockie settur i starv sum miðilsgrafikari í SVF. Benny er 21 ára gamal og havnarmaður. Hann tók sína útbúgving sum miðlagrafikari í Ålborg. Uppgávan hjá honum er at gera grafik til sjónvarpssendingar. Hann hevur arbeitt hjá Føroya Tele og lýsingarfyritøkuni Ímynd.

**mg**



## Trygvi Árting 80 ár



Í gjár, 11. mars, fylti Trygvi Árting í Havn 80 ár. Trygvi er føddur og uppvaksin í Havn, har hann gekk í barnaskúla og realskúla. Hann arbeiddi í mong ár á skrivstovuni hjá Balslev timburhandli í Eystaru Bryggju í Havn. Hann var ein av teimum fyrstu, sum tók prógv á Tekniska Skúla sum millumteknikari, hetta hevur verið fyrst í 60-unum. Trygvi var eitt tíðarskeið skrivari hjá Havnar Handverksmeistararafelag. Tá Føroya Ídnaðargrunnur bleiv stovnaður í 1970, varð Trygvi settur sum stjóri, og var hann eisini skrivari hjá Búskaparráðnum. Hann fór frá sum stjóri fyri umleið 6 árum síðan. Eitt langt tíðarskeið var hann formaður í Havnar Sjúkrakassa.

Trygvi var við í varðveitingararbeiðinum av sluppini Westward Ho. Føðingardagurin varð hildin saman við familjuni.

**mg**

## Minningarorð um Åge Olsen, Trongisvágur

**12. juni 1930 - 28. februar 2003**

Tann 28. februar andaðist Åge á Suðuroyar sjúkrahúsið 72 ára gamal.

Åge misti síni foreldur sum heilt lítil, so hann kom at vasksa upp hjá Hansinu og Eliesar Jespersen, sum hann var ógvuliga góður við. Åge fór sum ungur í læru til skipstimbrarar á bedingini í Trongisvági, seinni fór hann til Grønlands at arbeiða sum timburmaður í fleiri ár, hann arbeiddi eisini í Havnini í nøkur ár hjá Guttesen og Staksberg. Eisini arbeiddi hann sum formaður hjá Landsverksfrøðinginum í Suðuroy í fleiri ár, til hann fór frá vegna sjúku fyri 9 árum síðani. Í sínari frítíð dámdi Åge sera væl, at fara út á fjørðin, við báti sínum, at fiska. Hann var ein stillførður maður og ógvuliga blíður at koma at vitja.

Åge bleiv giftur við Annu og fingu tey 3 børn, Egil, Anniku og Jan, sum ahnn var ógvuliga góður við, og ikki minst síni 4 abbabørn..

Góða Anna, tú hevur verið ígjøgnum nógv við tínari sjúku, má Harrin styrkja teg og tíni, tí saknurin verður stórur hjá tykkum.

Við hesum fáum orðum vil eg lýsa frið um minni um Åge. Hvíl í friði

**Heilsan Evi**